

## Evropa streym úr Sahara

Nakrir granskarar hjá lærda Ben Gurion-háskúlanum í Ísrael eru eftir kanningar í fleiri ár komnir til ta niðurstøðu, at tað ber til at útvinna nógv meiri sólorku enn higartil hildið. Professarin David Faiman, sum hevur staðið fyri kanningunum, sigur við DR, at málið var at miðsavna ta einstøku sólarkyknuna 1.000 ferðir, so tað skuldi bera til at fáa 1,5 Kilowatt burtur úr hvørjari sólarkyknu ístaðin fyri 1,5 watt. Hesum málinum hava granskararnir nú rokkið, sigur professarin, sum er sannførdur um, at úrslitið kann fáa sera stóran týdning fyri altjóða orkuveitingina í framtíðini.

# Atlantis má klára seg fyri minni

**Eg eri sannførdur um, at mentanarhúsið Atlantis kann at klára seg við skerdu játtanini, sum býráðið hevur samtykt, sigur Jógvan Skorheim, formaður í mentanarnevndini í Klaksvíkar býráð**

SPARINGAR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

100.000 krónur mátti stýrið fyri Mentanarhúsið Atlantis í Kalksvík síggja hvørva av árligu játtanini, tá Klaksvíkar býráð í gjárkvøldið samtykti endurskoðaðu fíggjarætlanina - ein upphædd, sum kemur afturat teimum 50.000, sum býráðið fyrr í ár skarvaði av játtanini til einasta almenna mentanarhúsið í Klaksvík.

Men hóast játtanin til virksemið í húsinum harvið er skerd við 30 prosentum, er formaðurin í mentanarnevdnini, Jógvan Skorheim sannførdur um, at virksemið í húsinum kann halda fram.

- Lat meg siga tað soleiðis, at eg ikki hevði gingið við til eina skerjing í játtani, sum hevði við sær, at húsið má lata aftur. Sjálvandi skal virksemið í Atlantis halda fram. Tað verður bara við færri pengum eins og hjá flestu øðrum stovnum í býnum, staðfestir formaðurin í mentanarnevndini.



*Fyri aðru ferð í ár er einasta almenna mentanarhúsið í Klaksvík nú aftur rakt av sparingum*

### Fundast um loysn

Jógvan Skorheim vísir á, at upphæddin, sum nú er skarvað av játtani til Atlantis, frá byrjan var ætlað til at gera ábøtur á húsið. Hesar ábøtur eru nú gjørdar, og tí heldur hann ikki, at sparinghin eigur at fáa stórvegis ávirkan á sjálvt virksemið í húsinum.

- Sjálvandi hevði húsið kunnað økt sítt virksemi, um hasar 100.000 vóru tøkar hjá kommunini. Tað eru tær bara ikki á verandi fíggjarlóg, og tí má stýrið fyri húsið laga virksemið eftir nýggju treytunum, staðfestir formaðurin í mentanarnevndini.

Hendan spurningin fara limirnir í stýrinum fyri Atlantis at viðgera í dag, og tí ynskja tey at bíða við at úttala seg, til fundurin hevur verið.

Í viðmerking við Norðlýsið í gjárkvøldið segði daglig leiðarin í Atlantis, Høgni Klakkstein, at hann illa dugir at síggja, hvussu hann kann halda fram í starvinum við skerdu játtanini.

Um hetta eisini verður niðurstøðan á fundinum í dag, má ein onnur loysn finnast á leiðsluspurninginum í húsinum, metir Jógvan Skorheim. Hann vil tó ikki gera viðmerkingar til, hvør tann loysnin skal verða, fyrr enn stýrið hevur melda sína støðu út endaliga.

- Eitt hugskot kundi annars verið, at Atlantis sjálvt fer undir at skipa fyri tiltøkum, sum kunnu úvega húsinum meir pening, heldur Jógvan Skorheim

### Størri krøv

Fyri stuttum staðfesti nýggja býráðið í Klaksvík annars, at júst í krepputíðum er tað serliga umráðandi at vit hava eitt blómandi mentanarlív. Tí kann tað undra, at býráðið nú velur at spara á ein hátt, sum sambært, leiðaranum í Atlantis, mest sannlíkt fer at geva einasta almenna mentanarhúsinum í býnum mønustingin.

- Soleiðis skal hendan sparingin ikki fatast. Eg meini avgjørt, at vit skulu fjálga um mentanina í býnum, og vit hava jú eisini fingið fleiri nýggj mentanartilboð í Klaksvík seinnu árini. Hetta fegnast vit øll um, men ein avleiðing er jú, at tess størri eru okkara krøv til slík tilboð eisini vorðin, sigur Jógvan Skorheim.

Hann leggur afturat, at í so máta er støðan í Klaksvík í løtuni eitt dømi um tað, sum hendir, tá man setur eina rúgvu í gongd í góðum tíðum uttan at hugsa um, hvussu hesi tilboð skulu halda fram í vánaligum tíðum.

# Havnin fær nýggja Perlu

**Helst fer Tórshavnar Býráð í kvøld at samtykkja at byggja eitt spildurnýtt mentanarhús í Tórsgøtu. Húsið skal eita Perlan.**

MENTAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Á skránni til býráðsfundin í Havn í kvøld, hóskvøldið, er uppskot um at byggja eitt nýtt býarhús á økinum millum Miðlahúsið og Reinsaríið.

Umsitingin og fýra ymiskar býraðsnevndir mæla býráðnum til at bróta niður parkeringshúsini á økinum og í staðin at byggja eitt sonevnt býarhús, sum skal hýsa mentanarligum virksemi.

Býráðið samtykti fyri árum síðani at tilnevna Tórsgøtu til mentunargøtu. Síðan tá, hevur miðvíst verið arbeitt við at røkka hesum. Í dag húsast Tjóðpallur Føroya, Margarinfabrikkin, Miðlahúsið, matstøð og dansistøð í gøtuni. Og sum tað seinasta er Reinsaríið við at festa røtur sum eitt ískoyti til mentunartilboðini har.

Mentamálanevndin sigur í sínum tilmæli, at húsið skal fevna so víða, sum til ber, sum eitt alment býarrúm, har húsið sjálvt ikki er annað enn karmur um einahvørja mentanarliga nýtslu.

### Skal tola nógv

Hetta skal eisini síggjast aftur í byggingini, soleiðis at tilfar og skipan av bygninginum tolir nógva nýtslu og slit og leggur upp til hetta. Eisini sigur nevndin, at skipanin av húsinum skal vera soleiðis, at tað er lætt at umsita hjá brúkarum, og hon leggur ongar bindingar á slag av nýtslu, við tað at rúmini eru rein og einføld. Sostatt verður einasta treytin fyri nýtslu, at talan er um mentanarligt virksemi.

### Kostar 2 milliónir

Talan er um ein bygning, sum er 9,5 x 14,5 metrar, uml. 137 m2. Hann er 6 metrar høgur, so at innskotin hædd er uppá 3 x 14,5 metrar, uml. 43,5 m2. Bygningurin verður úr betongveggjum, stálkonstruktión og glasfasadum. Umframt uppihaldsøkir eru borðreiðingarrúm, 2 goymsluhølir og 2 WC-kjarnar.



Kostnaðarmetingin er umleið 2 milliónir krónur og skotið verður upp, at húsið verður kallað PERLAN.